# G KARIN KJØLBRO

ing av 5'ara børnum, læknum og læknabørnum. Hetta stendur greitt har, um Karin yvirhøvur hevur lisið so langt í bókini.

## Stikni til samkomuna

Restin av greinini er fylt av ófrættakendum og áhaldandi stikni til samkomuna í Betesda (líkist Sølvará) – og hví tað? Tí hvat munnu hesi hampafólkini hava gjørt Karini ella hennara?

Og síðani kemur ein endaleys syndarlig svada um, at tað er so synd í Karini sjálvari. Hon vevur runt og melur á kúluni í bók míni, henni hjá Líggjasi og teimum frá Asgaard, (ið var ein mjørkadalsmaður, ið eina tíð var giftur (orsaka meg, Karin, at eg nevndi orðið giftur) við einari abbadóttir Samma-Jóannes, men sum eg eftir fleiri royndir ikki fekk samband við.)

Og eg fái meg als ikki at vera við í jubilfestini hjá henni fyri Landslæknanum. Fyri mær og klaksvíkingum yvirhøvur var H. D. Joensen ein begávaður og valdgrammur maður, sum helst trongdi onkra hjálp. Hetta sigi eg ikki niðursetandi – bara konstaterandi. Eg havi tí - eftir evni – roynt at lýst hann við nøkrum grammum av humori eisini.

Nú er talufrælsi og skrivifrælsi loyvt í Føroyum - enn. Kann eg heilsa og siga. Og at eg eins og onnur, sum eisini standa Karini nær, eisini kunnu hava sína hugsan um onkran danskan embætismann. Og meiri er helst ikki vert at siga um tað her.

## Hvat er galið?

Eru greinskrivarinnan yvirhøvur og blaðstjórin, forrestin, í sálarligari ójavnstøðu (kanska nakað fyri andveikraverndina)? Tá kann tað vera gott og forloysandi viðhvørt, at taka øll skottini frá og lata allan brunan av traumum og frustrasjónum - sum hava tikið ilt fyri seg - bara floyma út á dúrkið.

Men, sum tá kann vera rættiliga óbehagiligt hjá einum ella øðrum at skula standa fyri hesum ófantaliga floyminum; men er hetta hinvegin til hjálp fyri tey viðkomandi. So er tó nakað vunnið við tí. Og má takast við. Ikki sannheit?

Tí tað er próvfast – hetta havi eg frá fleiri – at mong børn hjá foreldrum, sum ikki undirskrivaðu adressuna, og tí blivu roknað sum fimmarar – blivu als ikki happað! Og hví mann hetta vera??

## Lesitrupulleikar

At duga væl at skriva er ikki hvørsmans. Men enn verri er tað, táið ein, sum fæst við at skriva, ikki dugir at lesa. T. d. verður á bls. 40 í bók míni nevnt eitt citat við poengi í úr 3. kapitli hjá Malakiasi profeti (440 - 400 f. Kr.); men í greinini hjá Karini Kjølbro verður hetta (tvær ferðir) gjørt til eina prædiku av J. F. Kjølbro (1887 - 1967). Hetta ber vitiliga ikki til. Langt er millum menninar. Uppgávur teirra vóru ikki eins - og tilveran heldur ikki.

At eg rósi J. F. Kjølbro, sjálvum, fær eisini eina ódámliga viðmerking frá Karini; men er hetta so løgið, at hann verður róstur? Hann hilnaðist jú væl betri enn øll hini tilsamans. Og sporini eru djúpari.

At Karin heldur nógv av og lovprísar fyrrverandi verfaðiri sínum (og verandi við), og hon tí kann kenna seg - hansara vegna - særda, tað havi eg alla virðing fyri. Men mítt átak var, sum greitt er víst á í bókini, at upplýsa fyri eftirtíðini, hvussu vit vanligu borgarar í Klaksvík kendu okkum tá vera hagreidd av teim donsku embætismonnunum. Sum royndist enn ein sár endurtøka - eins og úr fornum tíðum!

## Betri borðbært?

Og hvat mann eitt nú Karin Kjølbro halda um tann so sera seriøsa (uha) søgufrøðingin, sum gevur alment út í bók (fyri almenna rokning) eitt privat bræv til Karsten og Misse Hoydal frá harra Hans Debes Joensen, ið var skrivað tann 11. juli 1955: "... Erlendur, hasin upphongdi búrkroppurin, sum eg saman við P. M. Dam vil ynskja ein pínsaman deyða..." (Hans Andrias Sølvará: "Frá tilboði til læknastríði", á bls. 279). Og hann heldur fram: " - men ikki eri eg vísur í, at hann (Halvorsen) ikki vísir gronina aftur. Um so verður stinga vit allir læknarnir av."

Er hetta ein yndislig kvøða, ein saklig viðmerking ella ein óhugnalig hóttan?

## Samanumtikið

Sagt, sum vitiligt er: So kenni eg – av skriving Karinar - als onga trongd til at at taka eitt einasta orðið aftur av tí, ið eg havi skrivað.

Hetta er og verður ein sera margháttligur partur av Føroya søgu, og her skrivað við hjartablóði av einum, sum var við í stríðnum, og sum ikki tekur synd í sær sjálvum ella bølir beiskur við hevndarhugi ella við traumatiskum minnilutakenslum.

Hóast vit, tann ovurstóri meirilutin í Klaksvík, sum bókin eisini sigur frá, taptu og kollsigldu í stronginum fyri hesum óatkomiligu maktunum við óítøkiligum mátti! (Kafka).

Álvaratos - og orsaki tit meg til seinast - so undrar tað meg almikið, at Karin Kjølbro, sum eg havi kent nakað, og sum ikki júst við smædnari seglføring hevur balist á ovastu lógarrókum í sonevnda sjálvræðispolitikki landsins, fær seg at skriva eina grein sum hesa.

Er hetta virkuliga tað heila, ið hon nú hevur eftir - at bera út á blik?

12 | Sosialurin Hugskot og viðmerkingar – send sms til 225000 Mikudagur 29. november 2017 · Nr. 139

KJAK

MILLUM HALGIMENNI, HETJUR OG ÓARGADÝR

– Hetta er ein hevdnarferð, og tað sigur kanska mest nakað um høvundin. Hjá teimum, sum fara væl av, at onnur fara illa, er henda bókin uttan iva undirhaldandi lestur, skrivar Karin Kjølbro í sera bersøgnari frásøgn um læknastríðið í Klaksvík í kjalarvørrinum á nýggjastu bókini um stríðið, »Herskin herindi«, sum Arnstein Niclasen hevur skrivað. Kjølbro-familjan var í minnilutanum og varð tí eyðmýkt, happað og kendu tey seg beinleiðis hótt eftir lívinum

Karin Kjølbro

» Fyri ein ordans skyld verður Kjølbro virðiliga umrøddur í byrjanini. So neyvt, at ein prædika hjá honum í Betesda verður nágreiniliga umrødd

Mikudagur 29. november 2017 · Nr. 139 Hugskot og viðmerkingar – send sms til 225000 Sosialurin | 13

KJAK

Ein kend mynd frá Klaksvíksstríðnum. Maður við byrsu á vaðhaldi. Á vágni siggjast Svínoyarbjarni og Barmur

» Eisini verður nógv gjørt burturúr, hvør av læknunum drakk brennivín. Slatur og sleyg verður rúmliga umrøtt

Juni 1992: Mamma mín, Turið, við ommusoninum Hanusi og abba hansara Hans Debes Joensen, fyrrverandi landslækni. Tey bæði fingu hvør sín ýmiska leiklut í Læknastríðnum

*Tað var í blaðnum mikudagin, at Karin Kjølbro, hevði eitt lemjandi ummæli av bókini hjá Arnstein Niclasen um Klaksvíksstríðið, »Herskin herðindi«*

> **» Og eg fái meg als ikki at vera við í jubilfestini hjá henni fyri Landslæknanum. Fyri mær og klaksvíkingum yvirhøvur var H. D. Joensen ein begávaður og valdgrammur maður, sum helst trongdi onkra hjálp**

---

setur eingin fyri annan, uttan fallkomin er sjálvur«!

Hvat velur Sambandsflokkurin: Fiskivinnunýskipan ella løgmanssessin til Sambandsflokkin.

Hvat velur Sambandsflokkurin: Vælferðina hjá Føroya fólki ella løgmanssessin til Sambandsflokkin?

Livst so spyrst.

Við kvøðu

---

# Ódiplomatiskar PRIMADONNA-nykkur



**Virgar T. Dalsgaard**

Uttan-ministarin Poul Michelsen hevur einaferð enn vakt herostratiskan ans við ófólkaligum og ódiplomatiskum atburði. Av berum fornermilsi noktar hann at luttaka á einum stórfundi um arktisk mál í Kjøpinhavn, hóast hann er formelt innboðin. Poul er annars sera ferðafegin og vandur við at ferðast alskyns sneisaørindi til bæð i Kina og Ruslands, men hann heldur seg ikki hava stundir at møta á einum substansiellum fundi um arktisk mál í Kjøpinhavn, tí hann er fornermaður við Danmark.

Tann umrøddi fundurin verður høgt prioriteraður av øðrum arktiskum londum, eitt nú Grønlandi.

Tað er tí ein barnslig og óbúgvin støða, sum Pouk í Uttastovu tekur í hesum máli.

Hevur hann øðrvísi uppfatan enn Danmark, er ríkiligt høvi til at framseta síni diplomatisku sjónarmið á einari slíkari kongress, heldur enn at krógva seg og lúna sum ein jólaskekil.

Har sum maður ikki er sjálvur, er hann ikki meira enn hálvur!

Men Poul í Uttastovu velir, sum vant ta fornermaðu rolluna og vil heldur knarra og gremja seg í føroyskum fjølmiðlum enn at møta á einum fundi, har hann kundi debattera við danskarar um hví og um hvat hann er SO fornermaður!

Uttan-ministarin hevur jú eisini fyri fleiri mánaðum síðani niðurprioriterað umboðsstovuna í Kjøpinhavn við at kalla tann føroyska sendimannin í Kjøpinhavn heim til Havnar at lúna.

Sum erkvisin primadonna hevur Poul í Uttastovu einaferð enn vunnið nógvan ans, men sum diplomatur er hann aftur dumpadur sum ein komisk rukka á teimum bonaðu gólvunum!